# VIÐMERKINGAR

## DAGSINS MEINING

# Politikkur og religión

Sunnudagin verður politiskur veljarafundur hildin í samkomuni Filadelfia, har umboð fyri allar flokkarnar verða við. Hetta tiltak er áhugavert og ger tað einki, um politikkur verður diskuteraður úti í samfelagnum íroknað samkomum. Politikkur viðkemur øllum og skal tí sjálvandi kunna verða viðgjørdur allastaðni.

Fyri tí um tað er í lagi, at politikkur kemur inn í samkomur, so er tað øvugta ikki galdandi. Religión og politikkur eiga ikki at tvinnast beinleiðis saman. Harfyri er ikki sagt, at religión ikki hevur ávirkan á politikk. Vit hava eina mentan, ið byggir á kristna siðalæru og hvør einstakur tinglimur hevur eina barlast, ið er úrslit av uppaling og umhvørvi annars, og hevur henda barlast sjálvandi stóra ávirkan á, hvusuu viðkomandi disponerar.

Tá vit siga, at politikkur og religión ikki eiga at tvinnast beinleiðis saman, so meina vit, at tá ein tinglimur trínir inn um tinggátt, so eru tað tær demokratisku spælireglarnar, ið galda og ikki átrúnaðarligar spælireglar. Átrúnaðarlig dogma hoyra ikki heima sum grundarlag í einum upplýstum samfelag í 2004. Lóggáva er fólksins vilji, óansæð um hesin vilji er í tráð við átrúnaðin ella ikki. Vit loyva við lóg hjúnaðarskilnað og endurgiftu, hóast onkur av átrúnaðarligum orsøkum er ímóti. Vit hava eina útbúgvingarskipan, ið, útyvir bíbliusøgu, lærir næmingar um hvussu Føroyar vóru til fyri nógvum milliónum árum síðani úr gosgrýti. Vit læra børn, at dinosaurar hava verið til og at jørðin er í støðugari broyting tí kontinentalpláturnar flyta seg og at evolutión ger seg galdandi í lívfrøðini. Hetta er, um ikki í andsøgn við, so er tað ikki strengt í tráð við tað, ið átrúnaður lærir okkum. Hetta vísir seg at rigga fínt. Átrúnaður trívist væl, hóast skúlaverkið ikki verður stýrt av átrúnaðarligum dogmum. Tað stendur einum og hvørjum frítt at trúgva tað ein vil í hesum landi, men tað stendur eisini einum og hvørjum frítt at ynskja lóggávu, ið er grundað á mannarættindi og annað enn tað religiøsa.

Soleiðis eigur tað at verða. Frælsi at trúgva og halda tað, ein vil, er grundleggjandi í hesum samfelagnum. Ávarast má ímóti at man innanfyri tinggátt fer móti tí teokratiska heldur enn tí demokratiska.

Øll hava eina meining um Ísrael. Staturin hevur sítt eksistensberættigilsi av nógvum orsøkum og eigur sjálvandi eins og onnur lond at hava lív lagað í frið og náðum, men ikki tí at Gud sigur, hann skal verða har. Hetta argument er ikki gott nokk í einari demokratiskari skipan og tað er heldur ikki gott nokk at halda blint við øllum ein partur ger, tí tey eru Guds útvaldu. Eitt talibanstýri, sum vit sóu tað í Afghanistan hoyrir ikki heima í einum demokratiskum heimi. Eitt prestastýri ella eitt stýri, har trúarsetningar heldur enn argument ráða, eru av tí ringa, óansæð, um talan er um Iran ella um hvussu man argumenterar út frá gamla testamenti um deyðadóm í bíbliubeltinum í USA.

Nógvar átrúnaðarligar livireglar eru grundleggjandi og lættar at argumentera fyri, sosum tey flestu av tíggju boðunum, men alt má kunna diskuterast, tí at argumentið "tað er Guds vilji" hoyrir ikki heima í einum demokratiskum parlamenti í 2004, hóast man heima hjá sær sjálvum ella í samkomum kann halda og gera tað ein vil, so leingi tað er í tráð við landsins demokratiskt avgjørdu lógum. Sosialurin vil fegin leggja pláss til eitt breitt og víðari orðaskifti um hetta í komandi Tinghellum.

**Sosialurin**

# Til ungdómin á Tvøroyri

**Hans Sørensen**
*Listi C*



VAL04

Hesi seinastu 3 árini er mín áhugi innan kappróðrarfelagið FSR bara øktur og stórtrívist eg har. Vit í nevndini hava samráðst við kommununa um eitt nýtt neyst, tí vit meta, at kommunan hevur forkomið okkum framtíðarmøguleikarnar har. Mín dreymur er fyrst og fremst, at FSR aftur skal teljast millum tey sterkastu kappróðrarfeløgini í Føroyum. Hetta kann gerast við, at vit m.a. byggja eitt mentanarhús, har FSR hevur alla ta niðastu hæddina fyri seg til sítt virksemið, og ovara hæddin kundi verið nýtt til ungdómin o.a.; her hugsi eg serliga um bólkin 18 ár og yngri. Tað skal ikki vera nøkur loyna, at eg eri ikki glaður fyri tey tilhaldstøð, sum ungdómurin nú heldur til (tey hava nevniliga einki). Eitt sovorði hús kostar ikki kommununi nógv við teimum fíggingarmøguleikum, sum vit áður hava víst á. Vit kunnu fáa upp til ein triðing av stuðli úr Føroya Mentanargrunni og so kunnu kommunan og FSR átaka sær restina av kostnaðinum. Hetta hevði frøtt tey, sum eru yvir 18 ár, so tey kundu havt TB-húsið fyri seg (aldursmark). Tey yngru høvdu sostatt kunnað hugnað sær í hesum nýggja húsi, har alkoholnýtsla bleiv totalt bannað. Kappróðrarfelagið tekur gleðiliga ímóti hesum ungdómi. Eisini kundi hetta hús verðið brúkt bæði til mentanartiltøk, pensionistafeløg, dansifeløg og nógv annað. Húsið kundi staðið við síðunar av Poul Hansen, heilsøluni, har veldigir møguleikar eru. Hetta er mín stóri dreymur, sum eg vóni gongur upp, um eg so komi í býðráðið ella ikki. Omanfyri nevnda, og framtíðina hjá ungdóminum annars, kann einans tú, sum fert á val 9. nov, avgera. Gott val.

# Kommunan fyri øll

**Jói Winther**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar kommunu*



VAL04

Her eru nakað sum má gerast sum skjótast.

Vegurin oman til studentaskúlan er ein deyðsfella og má breiðkast í stundini.

Økið við fótbóltsvøllin á Argjum má gerast, so tað er klárt hjá AB at koma í 1. deild.

Flakavirkið í Nólsoy má í gongd aftur, og alt má gerast fyri at stuðla teimum í vilja í gongd har.

Gamlarætt má gerast liðug, so at smábátar úr Velbastað, Kirkjubø og Hesti kunnu leggjast har.

Fleiri bátapláss mugu gerast í Kollafirði.

Útstykking av grundøkjum í Kollafirði má setast í verk beinanvegin.

Setast mugu ruskkonteynarar á keiøkini, so einki rusk verður koyrt á sjógv.

Ruskstøðin skal altíð verða opin fyri borgarunum.

# Havnin skal svína

**Rubek Lilaa**
*Valevni Tjóðveldisflokksins til býráðsvalið*



VAL04

Eftir fýra ára hugsjónarloysi og matadorpolitikk er tíðin komin, har umhvørvið aftur verður sett á skránna. Tað sum serliga fellur í eyguni og í nøsina, er Vestaravág.

Og tað er ikki hissini lívfrøðiligt margfaldni, sum kann upplivast har. Satt at siga eitt eksotiskt blómandi hav, av oljublettum, plastposum, hegnisliga kryddað við mannatrekki.

Vit muga tíverri bert staðfesta, at tey sum hava stjórnað býnum tey seinastu árini, hava tilvitað sett kikaran í deyva oyrað og ''beklagiliga" valt at síggja burtur frá umhvørvistrupulleikanum.

Um tú letur mær álitið 9 november, farið eg til verka á umhvørvisøkinum alt fyri eitt. Ásannandi at umhvørvið er ein týðandi partur av einum sunnum og mennandi samfelagi. Sum tú og E skulla liva í.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




VIÐMERKINGAR

# Broytingar eru hart tiltrongdar í Vágs Kommunu

**Leila Lisberg**
*Valevni fyri Javnaðarflokkin til býráðsvalið í Vági*

Vit skulu eitast at liva í einum demokratiskum landi. Er kommunalpolitikkurin í Vágs Kommunu demokratiskur? Heldur man tað vera vinar- og kenningapolitikkurin, sum hevur gjørt seg galdandi í Vágs Kommunu alt, alt ov longi, men nú er tíðin komin til at fáa broytingar í lag. Allir borgarar í eini kommunu mugu hava eins rættindi, bæði tá tað snír seg um arbeiði og um byggiloyvir. Og tá kommunan skal taka støðu til stór mál, sum t.d málið um ellisheimið og miðnámsskúlan, so eigur borgarin eisini at hava rætt til at blíva hoyrdur.

Viðvíkjandi uppstilling til kommunuval. Tað er ikki rættvíst, at tað verður uppstillað politiskt til eitt kommunuval, hetta bara skapar klandur ímillin høgru og vinstru. Valið hevði verið nógv meira rættvíst og demokratiskt um tað ikki var polittiskt. Vónandi fer komandi býráð at fáa hetta broytt.

Onnur tídningarmikil mál ið komandi kommuna má taka hond um:

- Syrgja fyri at ellisheimið verður bygt, so tey gomlu ikki skulu vera noydd til at fara av bygdini; og samstundis fáa vit nøkur hart tiltrongdarbeiðspláss. Hvar í bygdini ellisheimið verður bygt, og hvar miðnámsskúlin skal vera, eru tvey heilt ymisk mál, sum ongantíð burdu verið samanblandað, men tað blivu tey, og nú stendur tað upp til kommununa at finna útav, um ellisheimið skal liggja vesturi við vatnið, ella onkra aðrastaðni í bygdini. Kommunan skal bara syrgja fyri at tað verður bygt, og tað skjótt eisini.

- Fáa skil uppá hvar bygdarmarkið er, soleiðis at eisini teir borgarar, sum búgva í útjaðaranum av bygdini, skulu fáa somu sømdir sum hinir borgararnir. Her hugsi eg serstakliga um økini inni í Líðini og úti á Marknoyri. Hesi øki liggja við landsveg, og tí kann kommunan snúgva sær undan ábyrgd, tá trupulleikar uppstanda á hesum økjum. Vit sum búgva í útjaðaranum gjalda sama kommunuskatt sum hini, og eiga at hava somu rættindi.

- Drekkivatnið. Ein so stór kommuna sum Vágs Kommuna, við hægsta skattaprosenti í landinum, eigur at hava reint drekkivatn at bjóða borgarunum.

- Økið við skúlan. Tað er beinleiðis vandamikið hjá smáum børnum at ferðast einsamøll til og frá skúla. Hetta má broytast og fáa skil uppá, áðrenn ein álvarslig vannlukka hendur.

- Og til síðst, men ikki minst, vinnulívið. Familjutrivnaður og vinnulív eru tvey hugtøk sum eru tengd hvørt at øðrum, og eitt er víst, at skulu ungar barnafamiljur hava lívið laga í Vágs Kommunu í framtíðini, so má okkurt gerast á hesum øki. Kommunan má vera við til at skapa, og vera við til at stuðla feløgum og einstaklingum, við at fara undir nakað nýtt. Vit hava enn mest framkomna flakavirkið í landinum liggjandi stilt. Vit mugu og skulu hava hetta í gongd aftur!

Um Suðuroyggin skal kunna koma uppundan aftur, mugu allar bygdirnar í oynni standa meira saman. Gamalt nag má fáast burtur, tí vit koma ongan veg við at klandrast og øvunda hvørjum øðrum.

Gott val.

# Ein góð kommuna

**Meta C. Palle**



VAL04

Um tú ert í iva, so stilli eg upp fyri Javnaðarflokkin.

Men fyri meg er umráðandi, serliga nú kommunan er blivin so stór, at allir teir valdu limirnir fáa loyvi at arbeiða við borgarapolitikki. Vit stilla øll upp fyri at gera okkara besta.

So fyri meg er tann besta loysnin, at øll arbeiða saman fyri at fáa eina góða kommunu.

Men tað krevur nýhugsan og dirvi.

X við lista C.

# Skulu frælsar ítróttir hava mønustingin - ella?

**Robert Vilhelmsen**
*Valevni Javnarðarfloksins - listi C*



VAL04

Fyri skjótt 60 árum síðani tóku nakrar eldsálir seg saman og stovnaðu ítróttafelagið "Bragdið" - felag fyri frælsa ítrótt í Havn. Hesar eldsálir høvdu eina bjarta vón um, at frælsa ítróttin hevði eina framtíð í kommununi. Teirra fyrsta og størsta avbjóðing var at útvega eitt hóskandi øki til frælsu ítróttina - nú umleið 60 ár seinni er støðan júst tann sama.

Tað vóru fimleikarar, sum tóku stig til at fara undir frælsar ítróttir í Havn. Skjótt vóru teir í gongd við nógvum fjølbroyttum ítróttargreinum innan frælsa ítrótt og savnaðu fleiri hundrað áskoðarar í Gundadali, har felagið eisini bygdi síni egnu felagshús og stríddist fyri sínum tørvi á økinum. Vegna vantandi umstøður til venjingar minkaði virksemið so líðandi og lá heilt stilt í styttri og longri tíðarskeið.

Frælsa ítróttin blómar aftur, fýra feløg eru kring landið og skipað verður fyri kappingum allar árstíðir. Luttikið verður í kappingum uttanlands bæði við ungdómi og vaksnum. Størstu tiltøkini eru Flaggdagsrenningin, Tórshavn Marathon, Ólavsøkurenningin og nú til seinast eisini Fólkaheilsurenningin. Luttøkutalið hevur sett met hvørja ferð við upp til umleið 700 luttakarum og minst líka nógvum áskoðarum.

Bragdið hevur sett ein ungdómsvenjara og stórur áhugi er fyri hesum, men á einum øki er ongin broyting í mun til 1947 - álitið er framvegis fótbóltsvøllurin í Gundadali.

Skulu Føroyar gera seg galdandi í altjóða høpi, og tað kunnu vit, er neyðugt við munandi betri umstøðum og eitt stadion til frælsar ítróttir er loysnin. Hetta vil verða til stóran gagn og mennandi fyri flestu ítróttarfeløg, skúlar, ungdómsarbeiði og motionistar.

Vend má koma í, meðan vit enn hava eldsálir sum stríðast og enn síggja ein møguleika fyri framman. Við tínum stuðli og atkvøðu fer hetta at verða eitt av mínum fremstu málum at fremja í Tórshavnar kommunu.

# Stevning

**Birgir Sondum**
*Valevni á lista C*



VAL04

Las í Sosialinum, at Starvsmannafelagið nú hevur uppgivið at samráðast við býráðið, felagið sær seg nú noytt at stevna býráðnum.

Hetta hevur verið skilið tey seinastu 4 árini. Býráðið hevur tapt fleiri skir og verið noytt at rinda stór endurgjøld. Tað eru ikki smápengar, men tøl í 100.000 kr. klassanum. Okkara skattakrónur, tær kundu farið betur.

Býráðssamgongan seinastu 4 árini virðir ikki síni egnu starvsfólk.

Arbeiðsfólk verða løgd undir at skulka frá arbeiði, tá tey fara at fylgja líki, ella skulu til lækna.

Hetta má steðgast og álitið endurreisast.

# Til Vinnumálaráðharran!

**Svenning Borg**
*Vágur*



Nær ætla tygum, sum hægsti myndugleiki í Føroyum á vinnuøkinum, at Vágbingar skulu sleppa aftur til arbeiðis á flakavirkinum her?

Framtaksgrunnurin hevur lagt sína køvandi hond yvir flakavirkið og harvið verður tað. Er ikki tíð uppá at purra út í Framtaksgrunninum ella at skifta manningina út? Tygum hava myndugleikan til at gera tað og átti tað fyri langari tíð síðani at verið gjørt.

Nú tjóðveldi er fari úr samgonguni, skuldi kunna bori til at selt tey flakavirkini, sum ídag standa óvirkin, til áhugaðar á staðnum fyri ein prís,sum flakavirkið kann bera seg fyri, vónandi verður tað eitt krav frá eini komandi, nýggjari býráðssamgongu her á staðnum, at antin opnar flakavirkið aftur ella verður tað niðurtikið, so at grundøkið kann nýtast til annað endamál.

Nú, íð so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum av tí,at ov fáir keyparir eru til fiskin, eigur flakavirkið í Vági at sleppa í gongd aftur á privatum hondum so tað eisini kann verða við í kappingini um ráfiskin og at Vágbingar aftur kunnu fáa eitt virðiligt lív við einum arbeiði á sama støði sum aðrir føroyingar.

Sjálvur haldi eg,at vinnumálastýrið eigur ein part av skuldini fyri, at virki í Vági stendur tomt, flakavirkið átti ikki at staðið stilt í meira enn eitt ár so skuldi tað verið selt áhugaðum, so at arbeiðsplássi ikki datt niðurfyri, tað átti vinnumálastýrið at kent sær ábyrgdina av saman við Vágs býráð, men her hevur skorta uppá viljan til at loysa trupulleikan.

Havi varhugan av,at hendan samgongan, sum nú situr á løgtingi, hevur viljan til at loysa trupulleikan við flakavirkjunum og saman við eini nýggjari býráðssamgongu kann loysa trupulleikan við flakavirkinum í Vági.